TING-HELLAN

# Einkarrætt á ílegum, hv



TINGHELLUANALYSAN

*Gisela Eliasen, stud.scient.mol-bio*
*Bogi Eliasen, cand.scient.pol*





Einkarrættur og einkarrættarskipan eru vit á okkara leiðum von við, men skipanin rakar, eins og flestar aðrar, á mørk. Eitt øki á markinum er einkarættur ella patent á ílegum. Í seinastu grein greiddu vit frá ymsum hug-sjónum í ílegugransking. Hesi grundstøði hava stóra ávirkan á støðutakanina til einkarættin í mannaílegum.

Henda greinin tekur støði í, at vit eru partur av Danmark, at einkarrættur er ikki yvirtikið málsøki og at Danmark er bundið at ES direktivum á hesum øki. M.a Morten Dige, som situr í danska bioetiska ráðnum hevur víst á, at fleiri trupulleikar eru viðvíkjandi ognarætti av ílegum.

## Ílegulógin krevur støðutakan

Við nýggju ílegulógini og vónandi komandi raðferstingini á økinum komandi árini, gerst neyðugt at taka støðu til, hvat skal loyvast og ikki í Føroyum. Ein partur av hesum er patent ella einkarætturin.

Danmark er sum sagt bundið av ES á økinum, meðan vit ikki eru tað, men einkarrætturin er heldur ikki yvirtikin. Einkrættur er undir Vinnumálaráðnum og løggávan er ikki dagførd síðam 1978.

Danmark hevur valt at seta í verk lógir á biotøkniliga einkarrættarøkinum, sum eru so at siga einsljóðandi við ES direktivið, fyri ikki at koma í tulkingartrupulleikar. Einkarrættur hevur tað virknið, at tað skal verja uppfinningar, soleiðis at lønsemi kann fáast burtúr. Sigast kann at einkarætturin er við til at tryggja, at váðafúsur kapitalur er í gransking.

Tá talan er um ílegugransking, er tað t.d. viðurskiftini millum einkarrætt og siðsemi og ognarrætt og mannaílegur. Danski heimsspekingurinMorten Dige, vísur á, at talan er um tvær síður í hesum trupuleikanum:

1) Talan er um tað biotøkniska síðuna, ið sær DNA sum evnafrøðiligsligar sambindingar, og gevur hetta størri møguleika at fáa einkarætt.
2) Ikki biotøknisíðan, her er talan um trý høvuðs-sjónarmið um hví DNA er meira enn evnafrøðisligar sambindingar.

i) ílegur eru nakað serstakt
a) Skapanarteologi, ílegur eru Guds verk
b) Djúpdarvistfrøði, ílegur er tað livandi lívið og lívsins gáta.

ii) Ílegur eru serstakar
a) Skapanarteologi, ílegur er skaptar av Gudi í Guds mynd, og tí serstatus
b) Humanistiskt sjónarmið, menniskja hevur virðing (tign) og tí hava ílegurnar serligan status

iii) Tilverufilosofiskt, ílegurnar hjá tí einstaka eru tengdar at tí einstaka lívinum, og tí hava ílegurnar serligt krav um verju.

## Lógarkarmar fyri einkarrætt

Tað var í 1980 í USA at hurðin til einkarrætt á ílegubroyttum mikroverum bleiv latin upp. Í tí kenda dóminum í málinum millum Diamond móti Charabatsky, vóru fimm dómarar fyri og fýra ímóti at loyva einkarætti á eini ílegubroyttari mikroveru. Tí ber til at siga, at tulkingin hjá einum tilvildarligum dómara legði lunnar undir hesum møguleika tá.

ES londini eru bundin av eini rammulóg ella direktivi á hesum øki. Tað merkir at ES setir karmarnar, og síðan kunnu limalondini løggeva ymisk innanfyri karmarnar, men ikki í stríð við hesar.

Direktivið er ment við støði í nøkrum almennum viðmerkingum. Viðmerkingarnar kunnu sigast at vera framskygdar (visionerar) og tríggjar visiónir hómast.

1) Politiska skipanin ynskir at skapa rammurnar fyri biotøkniligari vinnu í ES og tryggja lagaligar treytir fyri ílegum við einkarætti.
2) Vísindin, visónin um at skapa tað góða lívið.
3) Ídnaðurin, er partvís idealistisk, men avgerðandi er inntøkumaksimering.

Danska einkarrættarlógin er gjørd innanfyri ES karmarnar. Danmark valdi at endurskoða einkarættarlógina soleiðis, at parturin um rættarliga verju av biotøkniligum uppfinningum er beinleiðis kopieraður frá ES direktivinum. Hetta fyri at burturbeina alla ótta um at samsvar ikki er.

Í føroyskum høpi er at siga, at økið ikki er yvirtikið og er afturútsilgt. Arbeitt hevur verið við at yvirtaka økið, og hóast arbeiðið var at kalla liðugt, steðgaði tað upp við seinasta løgtingsval. Sigast kann, at lógarverkið vit hava, als ikki er tíðarhóskandi.

## Einkarrættur í biotøkni

Tá talan er um einkarætt, verður vanliga skilt ímillum uppfinningar og uppdagingar. Í biotøkni kámast hetta markið, tí talan er um kopiering av náttúrligum fyribrigdi, sum verður ført fram sum uppfinning. Sigast kann at hetta ger, at DNA verður lutliggjørt - ella gjørt ítøkiligt

Fyri at meta um einkarætt í ílegum er tí m.a. neyðugt at meta um, um talan er um uppfinning ella uppdaging, um tað er náttúrligt ella eftirgjørt og um sambandið við livandi verur og persónar.

Í kapitli 6 í omanfyrinevnda ES direktivi stendur, at uppfinningar ikki mugu verða ósømiligar sambært almmennu fatanini í samfelagnum. Hetta verður rópt "siðsemis-paragraffin", tí einkarættarmyndugleikin skal gera eina konkreta meting um uppfinningin er innanfyri siðsømiligt mark. Eitt dømi hesum viðvíkjandi kundi verið broyting, soleiðis at komandi foreldur sluppu at velja kynið á barninum.

## Biotøknilig og medisinsk virði

Sum sagt hevur ídnaðurin síni áhugamál, meðan gagnsiðsemið, sum okkara samfelag í stóran mun er bygt á, skal hugsa um hvørji virðir samfelagið fær burturúr. Hetta kunnu verða møguleikarnir fyri betri og bíligari vigerðum og soleiðis møguleikin at brúka pening, sum í dag er bundin í heilsuskipanini, til annað.

Flestu eru samd um, at íløguhugurin í uppfinningar er tengdur at møguleikanum fyri einkarætti, sum gevur møguleikan at vinna pening burturúr. Men verandi einkarrættarkipan er trupul í mun til biotøkni, tí tað er tíðarkrevjandi at fáa einkarætt og loyvir í einkarættsskipanini,